# Karl Johansen (Karl hjá Talis) til áminningar



Soleiðis fara tey undan okkum um seinastu sýnina. Nú fór Karl hjá Talis

Tung og nívandi vóru boðini sum okkum bórist í lýsingini henda feigdarmorgun 15 februar 2002.

Karl er farin. Tað tyktist sum um at alt steðgaði upp. Hevði verið til arbeiðis dagin fyri og ikki óraði tað okkum at hann somu nátt skuldi rógva seinasta brattan og leggja árarnar inn.

Hesin merkismaður, sum legði so nógv eftir seg í føroyskari arbeiðarasøgu skuldi nú ikki vera okkara millum longur og enn einaferð taka vit til okkum orð Harrans um at hansara vegir eru ikki okkara vegir.

Karl var valdur í nevndina í Havnar Arbeiðsmannafelag í 1975 og árið eftir varð hann valdur til formann. Hevði júst hildið 25 ára starvsdag sum formaður nú so brádliga boð vóru eftir honum.

At standa við stýrisvølin í einum arbeiðarafelag í samfull 25 ár krevur sín mann og at limirnir lótu Karli upp í hendi at umsita hetta abyrgdarstarv øll hesi ár, sínir tað álit og virðing sum Karl hevði millum limir felagsins og hann umsat sanniliga eisini hetta álit við størstu virðing fyri tí yrki sum felagið umboðar.

Karl var framsíggin og vitugur maður. Dugdi sera væl at bera sjónarmið arbeiðaranna fram, tað verið seg í samráðingum ella millum manna. Legði onki í at balla nakað inn. Øll sum vildi skilja sjónarmið hansara skiltu tey, tí hann kallaði ein spaka fyri ein spaka..

Karl var eisini dámligur og hóvsamur maður. Hevði ta sannføring at samráðingarleiðin var tann leið sum fyrst skuldi roynast út í æsir áðrenn onnur stig vóru tikin. Hinvegin var hann ikki blindur fyri at tað kundi gerast neyðugt at nýta aðrar møguleikar.

Tá okkurt kanska ikki gekk soleiðis, sum vónað hevði verið, plagdi hann at taka nakað soleiðis til. "Tað nyttar onki at vera vónbrotin tí tað hava vit ikki ráð til innan arbeiðararørðsluna – hvør dagur hevur sínar avbjóðingar og vit eiga ikki at leggjast á tað sum farið er men eiga at hyggja frameftir".

Karl var virkisfúsur, nærlagdur og eldhugaður í øllum sum hevði við felagsins viðurskifti at gera og tað lá honum nær at virka soleiðis fyri at felagið kendi sær tryggan og góðan grundvøll at byggja virksemi sítt á.

Eitt av hjartamálum Carls var Eftirlønargrunnurin hjá felagnum, sum tað eydnaðist at fáa sett á stovn 1.august 1983. Hesin grunnur hevur eisini uttan iva dugna teimum limum sum farnir eru um eftirlønaraldur og hava fingið útgjald úr grunninum. At fleiri av eldri limunum vóru komnir at heilsa honum á 25 ára formannsdegnum frøddi hann almikið og hugstoytt er at lagnan vildi honum tað soleiðis at hann sjálvur ikki skuldi fáa lut í tí ágóða sum hann hevði verið so eldhugaður fyri at fremja limunum at gagni.

Í orðsins rætta tídningi hevur felagið við Karli mist ein trúgvan arbeiðshugaðan stríðsfelagaða sum seint verður gloymdur.

Góða Thea og børn. Við tøkk fyri tíðina okkum untist at hava Karl innanborða okkara millum og við størstu virðing fyri ta yrki hann útynti arbeiðaranum til frama drýpa vit høvur í djúpastu samkenslu við tykkum.

*Sum fuglur tú fegnast um spírandi vár*
*um lívið sum sprettir úr moldum*
*tó stókkut er tíðin og tald eru ár*
*sum tær eru givin á foldum*

*Hvør dagur sum dropar í tíðurnar hav*
*hvør løta úr ókendum kemur*
*brátt kvøldar í vestri og sól fer í kav*
*og deyðin at hjartanum nemur*

*Nú hvílir tú frægi í døggvátu lág*
*og slept hava harðballnar hendur*
*nú fjørður er rógvin og stillin er vág*
*tín kós móti himni sær vendir*

Friður verur við minni tínum kæri vinur

**Havnar Arbeiðsmannafelag**




# Páskamøtir á Kambsdali og í Fuglafirði

TÍÐINDASKRIV

Í úti við hálva øld hava møtir verið hildin á páskum í Fuglafirði. Øll hesi mongu ár eru fólk ymsastaðni frá í landinum komin saman í Siloa til páskamøtir. Men nakað eftir at Ítróttarhøllin á Kambsdali var komin, varð byrjað at hava nøkur av møtunum har. Síðani tá hava tær tríggjar samkomurnar í Siloa, Fuglafirði, Hebron í Leirvík og Filadelfia í Gøtu skipa fyri møtunum. Eisini er skipað soleiðis fyri, at møtini tey seinnu árini hava verið annaðhvørt ár á Kambsdali og annaðhvørt í Ítróttarhøllini í Runavík.

Aftur í ár verða so hesi páskamøtir. Byrjað verður í Siloa skírisdag kl. 18, og hildið verður fram langa fríggjadag kl. 11 og 18.

Leygardagin verður so farið út á Kambsdal. Har verður byrjað kl. 14 við einum sonevndum temadegi. Hetta er eitt øðrvísi tiltak, har eitt ávíst evni verður viðgjørt. Evnið hevur fingið heitið: At koma hvørjum øðrum við. Fyrst verða framløgur, og síðani fáa áhoyrararnir høvi at viðgera evnið í bólkum.

Fyrireikararnir siga, at hetta tiltak er ætlað øllum aldursbólkum, frá ungum til gomul. Kl. 20 verður ein sangløta, har dentur verður lagdur á nógvan og góðan felagssang, bæði eldri og yngri. Men eisini verður onkur sangbólkur við, m.a. Miðnáttarsangbólkurin, ið var nógv frammi í sekstiárunum. Kl. 22 verður so opið hús í Siloa fyri bæði yngri og eldri við drekkamunni, sangi, vitnisburði o.ø.

Páskadag verður møti við breyðbróting á Kambsdali kl. 11. Barnamøti verður í Siloa kl. 15, har øll børn - eisini úr øðrum bygdum - sjálvandi eru vælkomin. Kl. 18 verður møti á Kambsdali og kl. 22 verður so aftur opið hús í Siloa.

2. Páskadag eru møti á Kambsdali kl. 16 og 18. Ímillum tey bæði møtini verður ein máltíð til øll.

Ymsir bidnir talarar fara at hava orðið á hesum møtum, men eisini verður orðið frítt, so høvi verður hjá øðrum at bera fram eitt orð. Sangkórið í Siloa fer at syngja á tveimum av møtunum. Eisini verða sangkreftir úr Gøtu og Leirvík.

Øll verða boðin at verða hjartaliga vælkomin til hesi møtir.

## Tak

Den overvældende deltagelse,
ved vores mors –

***Tove Helene Mommer***

– død og begravelse,
gør det umuligt for os at takke hver enkelt.

Derfor siger vi på denne måde
hjertelig tak for de mange blomster
og venlig deltagelse.

**Benedicte, Ole og Per**

Nr. 59 - 26. mars 2002 Sosialurin 3




# Æti og fiskur

TÍÐINDASKRIV

ALMENNUR FYRILESTUR verður á Fiskirannsóknarstovuni hóskvøldið 4. apríl 2002 kl. 20.00. Eilif Gaard, lívfrøðingur heldur fyrilestur, ið hann kallar: Æti og fiskur.

Eilif Gaard er útbúgvin lívfrøðingur á Universitetinum í Odense í 1986 og vardi doktararitgerð um æti og vistfrøði á føroyska landgrunninum við Universitetið í Tromsø í fjør. Hann starvast á Fiskirannsóknarstovuni og er harumframt tilknýttur lektari á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum.

Greitt verður frá um æti á landgrunninum, hvussu tað ávirkar tilgongd og vøkstur hjá fiski, og hvussu landgrunnurin virkar sum vistskipan.

Gróðurin á landgrunninum føðir og nørir smáa djóraætið, ið er føði hjá fiskalarvum og -yngli, og tað er eisini føði hjá botndjórum. Gróðurin er ójavnur ár um annað, og samanbera vit tilgongd og vøkstur av fiski, er týðiligur samanhangur. Tey ár, tá gróðurin er góður, er tilgongdin av toski góð, og hann veksur væl. Og øvugt, tá gróðurin er lítil, er tilgongdin vánalig og vøksturin lítil.

Í fyrilestrinum verður m.a. greitt frá, hvussu óvanligar umstøðurnar vóru á landgrunninum fyrst í 1990 árunum, og hvussu hetta ávirkaði fiskatilfeingið.

